# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



Ein vakran sólskinsdag tann 9. august á middegi, var henda lítla diddan fødd á sjúkrahúsinum á Frederiksberg. Hon vigaði 3900 gram og var 54 cm long, men tað tók ikki dirvið frá einum stoltum og spentum stórabeiggja Mikal at taka hana í fangið. Foreldur eru Sigrun Dalsgaard Hansen og Ósbjørn Jacobsen, øll búsitandi á Frederiksberg í Danmark.

10. august fingu Hanna Vágsheyg og Birgir I. Sigurðsson, bæði úr Klaksvík, búsitandi í Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

10. august fingu Helga Rúnadóttir Øster og Jógvan Elias Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3550 gr.

11. august fingu Torgerð Dam og Johnny Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2940 gr.

11. august fingu Maria og Dorel Cerveneac, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3650 gr.

12. august fingu Rúna Seyer Hansen og Hjalti Eliasen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

13. august fingu Margit og Gunnar Justinussen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3225 gr.

13. august fingu Beinta og Páll Hammer, Saltangará, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3350 gr.

15. august fingu Henny Vest og Malvinus í Gong, Klaksvík, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4800 gr.

15. august fingu Maria og Viggo Johannesen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3750 gr.

Týsdagin fingu Berit og Kári á Presttrøðni, Miðvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3850 gr.

17. august fingu Annfríð og Magnus Neslíð, Toftir, eina dóttur. Hon var 59 cm. long og vigaði 4750 gr.

18. august fekk Kristian eina lítlasystur, sum var 50 cm. long og vigaði 3000 gr., foreldrini eru Rúna Debes Christiansen og Hanus Kúrberg, Tórshavn.

## Brúdleyp

Í dag, 20. august kl. 16.00 giftast í Vestmanna kirkju Svanna Jákupsdóttir, Hoyvík og Meinert J. Olsen, Vestmanna. Brúdleypsadr.: Hotel Føroyar.

Í dag, 20. august kl. 14.00 giftast í býráðssalinum í Havn Maria Vang, Tórshavn og Niels Pauli Justinussen, Leirvík. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30.

Í dag, 20. august kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Harriet Poulsen, Tórshavn og Teitur Vágadal, Argir. Veitslan verður fyri innbodnum í Villingardalsvegi 45.

Í dag, 20. august giftast í Fuglafjarðar kirkju Vár Róin og Sigfrid Petersen. Veitslan verður fyri innbodnum í Mentanarhúsinum.

Í dag, 20. august giftast í Rommele Kyrka (Trollhättan, Svøríki) Linda Nilsson og Johannes Danielsen, Tórshavn. Brúdleypsadressan er c/o Nilsson, Åkersbergsvägen 40, 461 40 Trollhättan, Sverige. johsd@yahoo.com

## 70 ár

Fríggjadagin 19. august fylti Brynjólvur Petersen, Svalbardsvegur 13, Tórshavn, 70 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 20. august í HB-húsinum kl. 19.00.

# 30 ára starvsdagur



Mikudagin 17. august hevði Páll Joensen í Leirvík 30 ára starvsdag sum maskinmeistari í Sp/f Tavuni í Leirvík. Hann byrjaði í 1975, tá flakavirkið hevði navnið P/f Frost, og helt síðan áfram tá virkið bleiv yvirtikið av Sp/f Tavuni.

Páll er leirvíkingur. Sum ungur fór hann í læru á Skála Skipasmiðju sum maskinsmiður og starvaðist eisini har, eftir at hann var liðugur at læra.

Í 1960 árunum og til mitt í 70 árunum starvaðist hann í Føroyingahavnini sum maskinmaður, til hann fekk bjóðað starvið sum maskinmaður í P/F Frost í Leirvík.

Páll starvast framvegis sum maskinmaður, hóast hann er 74 ára gamal og hevur mangan langan arbeiðsdag nú í gulllaksasesongini.

Tey fyrstu árini var Páll einsamallur sum maskinmaður, men tey seinnu árini hava teir verið tveir.

Arbeiðið á virkinum hevur ofta verið skiftandi framleiðslur við mongum ymiskum maskinum og tøkni, og hevur hetta mangan kravt nógv av maskinmanninum, men altíð hevur Páll klárað at loyst hesar uppgávur.

Páll er ein stak lagaligur maður og er ikki lættur at taka av fótum hvørki so ella so. Hann er ruddiligur og snøggur, og tey sum umgangast hann bera honum alt tað besta.

Foreldrini hjá Páll vóru Pól, vanliga nevndur Pól við Garð, úr Leirvík, og Lena, vanliga kallað Vestmanna-Lena, úr Vestmanna. Hann er giftur við Herborg, f. Justinussen, úr Leirvík, og fyri kortum kundu tey halda gullbrúdleyp.

Herborg og Páll eiga 5 børn: Malan, Absalon, Poul, Thomina og Heiðrik. Tey eiga 11 barnabørn og 5 langommu- og langabbabørn.

Vit ynskja Páll tillukku við 30 ár starvsdegnum.

**x.**

# Trine avlærd sum bygningsmálari

Í dag, leygardagin 20. august 2005, er Trine Ørvarodd í Havn avlærd sum bygningsmálari hjá Málarameistaranum Una Zachariassen í Hoyvík.

Lærumeistari var Uni Zachariassen.

Trine er donsk, ættað úr Århus, og flutti til Føroya fyri fýra árum síðan, tá hon fór í læru sum málari. Hon trívist væl í málarafakinum, og á tekniska skúlanum í Århus fekk hon bronsu fyri næstbesta karakterin í klassanum.

Hon er fyrsti kvinnuligi málari, sum hevur tikið sína útbúgving hjá føroyskum lærumeistara.

Trine er 20 ára gomul og er gift Finn Ørvarodd í Havn.

Í løtuni er Trine við í arbeiðinum at mála Hotel Tórshavn í Tórsgøtu í Havn.




*Trine Ørvarodd saman við lærumeistaranum Una Zachariassen*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Dagurin**

**20. august. Bernhard,** deyður í 1153. Abbati og kirkjulærari í Fraklandi. Kom upp í munka- og nunnuskipanina, ið róptu seg *cisterciensaraskipanin.* Har gjørdist hann skjótt oddamaður, og fekk stóran týdning í kirkjupolitikki og kirkjulæru í 12 øld. Bygdi í 1115 kleystrið Clairvaux og varð síðani róptur Bernhard úr Clairvaux. Hann var vanur at taka til: *Ora et labora* (bið og arbeið). Navnið er germanskt og merkir *bjørn og harður.*

**21. august. Sálomon.** Til minnis um hin vísa kongin Sálomon, sum sagt er frá í kapitlunum 1-11 í fyrru Kongabók í Gamla testamenti.
Navnið merkir *friður og vælferð.*

**22. august. Symphorianus,** deyður í umleið ár 180. Kristin ungur maður úr Autun í rómverska landinum Galliu (Suðurfraklandi). Varð tikin av døgum, av tí at hann ikki vildi tilbiðja skurðgudamyndir í Cybeletemplinum.